FYLGISKJAL 4

LM-018/2022

Til

Almannamálaráðið

Tórshavn 5. september 2022

Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti
(Oljuískoyti til húski)

Fakfelagssamstarvið tekur undir við uppskotinum at lata eitt ískoyti til fíggjarliga sperdar familjur, fyri at minka um avleiðingarnar av tí ovurhonds stóra prísvøkstrinum, ið hevur verið síðstu mánaðirnar.

Sambært hálvárligu búskaparfrágreiðingini hjá Búskaparráðið var prísvøksturin í 2. ársfjórðingi 7,3%. Hendan øking í livikostnaði hevur tikið fíggjarliga grundarlagið undan nógvum familjum, og tí mugu hesi fáa eina fíggjarliga hjálp, so at familjurnar og børnini ikki koma at liva í fátakraváða í longri tíð, av umstøðum, ið tey onga ávirkan hava á. Tað kann hava skaðiliga ávirkan á familjuna og serliga børnini at liva í fátakraváða, hóast talan kann vera um eina møguliga lutfalsliga stutta tíð.

Sambært uppskotinum kunnu bara húski, sum lúka treytirnar um inntøku og ogn, og sum kunnu skjalprógva útreiðslur til olju til upphiting av bústaðnum, har tey búgva, fáa rætt til oljuískoyti. Hesum taka vit ikki undir við. Uppskoti eigur at taka hædd fyri samlaða prísvøkstrinum, og ikki bara taka hædd fyri hægri oljuprísi. Øll eiga at hava møguleika at fáa eitt ískoyti, og ikki bara tey, ið hita húsini við oljufýr.

Uppskoti eigur at taka hædd fyri samlaða prísvøkstrinum, og ikki bara taka hædd fyri hægri oljuprísi, tí at prísurin á øllum gerandisvørum er hækkaður, so sum mjólk, mjøl, breyð, kjøt, pasta, pálegg, o.a.. Øll, ið merkja sviðan av hækkaða prísstøðinum í samfelagnum hava tí tørv á einum ískoyti. Øll eiga at hava møguleika at fáa lut í hjálpini, og ikki bara tey, ið hava eina inntøku undir eitt ávíst mark og hava oljufýr. Samlaða prísstøðið í samfelagnum er vaksið munandi hjá øllum føroyingum, og ikki bara oljuprísurin.

Tað er týdningarmikið, at ískoyti rakar rætt, og øll sum merkja sviðan av stóra prísvøkstrinum, eiga at fáa ágóðan av ískoytinum. Tað sum merkist í gerandisdegnum hjá familjunum er, hvør

tøkupeningurin er, ella tað sum er eftir, tá allar kravdar útreiðslur eru goldnar. Uttan mun til hvør inntøkan er, so kann tøkupeningurin vera ymiskur. Tað eru familjur, ið eru hart spentar fyri fíggjarliga, m.a. við stórum útreiðslum til bústaðarlán, uttan mun til inntøku. Hesi eiga eisini at hava møguleika at fáa lut í hjálpini, nú gerandisdagurin er vorðin munandi dýrari av umstøðum, ið tey onga ávirkan hava á. Tí eigur uppskoti eisini at rokna við, hvør tøkupeningurin hjá familjuni er, og ikki bara inntøkan og ogn, og um húsini eru hitað við oljufýr.

Landskassin hevur longu fingið stórar meirinntøkur í MVG, av at prísirnir eru hækkaðir so nógv. Tí er tað ikki annað enn rímiligt, at landið letur meirinntøkurnar aftur til tey, sum eru komin í fíggjarliga trongstøðu av stóra prísvøkstrinum í samfelagnum. Hetta eigur eisini at vera tikið við í roknistykkið í almennu viðmerkingarnar til uppskoti.

Fakfelagssamstarvið